**bóka ummælið**

mortan@hamrabyrgi.com

# Familjulív – uttan kemi




Hvønn dag lesa og hoyra vit um evnir, ið nú eru vorðin vandamikil fyri menniskju. Hetta kunna bæði vera vælkend evni og meira ókend evni.

Eitt nú um øll tey tilsetingarevni, ið matframleiðarar koyra í matin. Øll E-numrini. Summi av hesum eru heilt óskaðilig, meðan onnur eru sera ivasom. Hvussu skula vit skyna á hesum? Vit kunna heldur ikki bara ræðast ølllum við einum E-fornavni.

-Er vistfrøðiligur matur sunnari enn ikki-vistfrøðiligur?

-Er nitrit vandamikið?

-Og hvussu við hesum azolitevnunum í góðgæti?

Allir hesir spurningar og fleiri kunna svarast í nýggjari bók frá forlagnum Lindhardt & Ringhof. Tað eru tey bæði, Lene Midtgaard, Cand. Scient. Pol. og Tino Rabe Tønnesen, Cand. Techn. Soc., ið við akademiskum førleika, greiða frá hvussu modernaða familjan í dag kann liva uttan vandamikla kemi.

Og tað er ikki bara maturin, ið verður viðgjørdur í "Famile uden kemi – guide til en sundere hverdag".

Eisini sápur, krem, babyolja og annað til kroppin fær umrøðu. Og klæðir, innbúgv, leikur og elektroniskir lutir.

Alt, ið familjan hevur samband við í gerandisdegnum kann innihalda vandamikil evni. Við hesari bókini kanst tú dagføra tína vitan og taka støðu til øll hesi mál, ið ikki øll eru greið enn.

Ein listi er eisini í bókini yvir vørur, ið hava norðurlendska svanamerkið, sum borgar fyri umhvørvis-vinarligar vørur.

"Familie uden kemi – guide til en sundere hverdag", Lene Midtgaard og Tino Rabe Tønnesen, Lindhardt & Ringhof, 218 blaðsíðir, innbundin, uml. kr. 230 í førysku bókhandlunum.







Mortan í Hamrabyrgi umrøður nýggjar bøkur um mat og drekka







